# Eiga at skifta ferðmátararnar í Airbus

Evropeiska flogverksmiðjan Airbus mælir nú øllum flogfeløgum, sum brúka Airbus-flogfør á sínum longu rutum, til at skifta ferðmátarnar út. Áheitanin er ein avleiðing av vanlukkuni tann 1. juli, tá eitt Airbus-flogfar hjá Air France datt niður í Atlantshavið á veg úr Brasil til Fraklands. Hóast teir svørtu kassarnir í flogfarinum ikki eru funnir, kennir franska vanlukkunevndin seg rættiliga vísa í, at vanlukkan stóðst millum annað av einum breki við ferðmátarunum í flogfarinum. Áheitanin frá fronsku verksmiðjuni umfatar tey umleið 200 flogførini av sløgunum A330 og A340, sum fleiri feløg brúka á sínum longu rutum.




# Arbeiðsloysið størri

Danski arbeiðsmarknaðarmálaráðharrin, Inger Støjberg, væntar, at støðan á danska arbeiðsmarknaðinum fer at versna eitt sindur afturat við veksandi arbeiðsloysi, áðrenn gongdin fer at venda. Ráðharrin sigur við danska kringvarpið, at nógvir arbeiðsgevarar góvu fólki uppsagnarskriv í vár, men at tey flestu hava verið í arbeiði til nú, og tí er arbeiðsloysið vaksið heldur meiri í summar enn fyrr í ár. Hon væntar, at færri arbeiðsgevarar fara at koyra fólk til hús tað, sum eftir er av árinum, men at tey arbeiðsleysu kortini verða fleiri í tali um ársskiftið enn nú. Í juni vóru 105.100 danir skrásettir sum arbeiðsleysir.

# Løgmansrøða og heimastýrisligt túnatos


*- Tað nyttar einki hjá løgmanni bara at fortelja fittar søgur, meðan alt hendir rundan um okkum, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi*

*Mynd: Beinta Haraldsen*

**- Løgmansrøðan hevði einki veruligt samband við føroyska samfelagið og tær avbjóðingar, ið vit standa yvirfyri í dag, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi**

ÓLAVSØKURØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Høgni Hoydal hevur einki gott at bera teirri løgmansrøðu, sum Kaj Leo Johannesen helt á ólavsøku.

- Har var einki nýtt, og løgmaður kundi eins væl havt hildið somu røðu fyri 10 árum síðan. Tey positivu tingini, hann nevndi, eru ikki framd av hesi samgonguni.

Formaðurin í Tjóðveldi sigur, at røðan í størri mun enn nakað annað bygdi á heimastýrisligt túnatos, sum hann tekur til.

### Avbjóðingar

- Røðan hevði einki veruligt samband við føroyska samfelagið og tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman hjá okkum í dag. Tær metingar, sum Kaj Leo Johannesen gjørdi sær av viðurskiftunum, vóru rættiliga nógv pyntaðar og tey mál, sum hann segði samgonguna vilja fremja, eru longu framd.

Formaðurin í Tjóðveldi heldur, at hetta er ein løgin og margháttlig støða at vera í, nú vit sum samfelag standa yvirfyri stórum avbjóðingum.

- Eg haldi ikki, at løgmaður sigur tingini, soleiðis sum tey eru veruleikanum eru, leggur hann aftrat.

Høgni vísir á, at hesir somu flokkar, sum sita við landsins leiðslu í dag, hava komið Føroyum í eina sera trupla støðu, men kortini hoyrist eingin eftirmeting av tí, ið sum hesir flokkar hava gjørt seinastu árini.

- Eingin eftirmeting og eingin endurskoðan, og hetta sakni eg álvarsliga, leggur hann aftrat.

### Siðaskifti

- Vit hava rættiliga brúk fyri einum siðaskifti í Føroyum. Leggjast má veruliga á annan bógv, og ætlanir mugu leggjast, sum røkka út um eitt valskeið. Sum er, verður bara malið í ring.

Høgni Hoydal vísir á, at løgmaður slett ikki tosaði um viðurskifti, sum Tjóðveldi metir hava størsta týdningin, nú vit eins og onnur samfeløg mugu leggja á annan bógv.

- Kaj Leo tosaði bara um framhald av verandi politikki yvirhøvur – einum politikki, sum eingin politikkur er. Hann tosaði um fjarðar, ið als ikki hóska til fuglin, sum formaðurin í Tjóðveldi tekur til.

Hann heldur, at tað, sum føroyska samfelagnum í størstan mun tørvar í dag, er ein politikk, sum byggir á gransking, mentan og sosial viðurskifti, og har vinna bæði á sjógvi og landi er burðardygg.

- Tað kann vera skilagott at brúka 100 miljónir krónur aftrat til íløgur, sum løgmaður førdi fram, men skal nakað skilagott fáast burtur úr hesum, er neyðugt at endurskoða núverandi íløguætlan. Annars verður ikki peningur til nakað nýtt.

### Stór mál

Høgni Hoydal vísir á, at bæði Føroyar og umheimurin ikki bert er raktur av fíggjarkreppu, men so sanniliga eisini eisini eini umhvørvis-og orkukreppu, har neyðugt er at leggja um til heilt aðrar framleiðslur, um vinnulívið skal klára seg frameftir.

- Tað er ostaklokkan, sum verður penslað út í hesi løgmansrøðu, har løgmaður og hansara fólk í landsstýrinum halda, at Føroyar bara kunnu liggja, her tær liggja – og síðan halda, at alt stendur væl til. Tað nyttar einki bara at fortelja fittar søgur, meðan alt hendir rundan um okkum, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi.

# Løgmansrøðan ikki frameftirlítandi

**John Johannesen, formaður Javnaðarfloksins á tingi, heldur ikki, at løgmansrøðan leit serliga langt frameftir, sum hann kundi hugsað sær, at løgmaður gjørdi í síni røðu á ólavsøku. – Vit fara nú at gera okkara viðmerkingar, sigur hann**

ÓLAVSØKURØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Løgmansrøðan var soleiðis, sum man kundi vænta sær hana frá Kaj Leo Johannesen, løgmanni. Hann gjørdi fitt burtur úr menniskjansliga tilfeinginum, sum er í fólkinum, og hann brúkti eisini fitt av orðum til at líta aftureftir til teirra, sum bygdu hetta land. Einki ringt skal sigast um hetta. Tvørturímóti, tí vit eiga sjálvsagt at virða tey, sum undan okkum fóru. Hinvegin haldi eg, at løgmaður í nógv størri mun átti at hugt frameftir, enn hann gjørdi í síni røðu.

John Johannesen, formaður Javnaðarfloksins á tingi, heldur, at løgmaður kundi gjørt meira burtur úr summum málum enn øðrum.

- Umrøðan av løgmansrøðuni verður mánadagin, og tá fara vit at koma við okkara røðum og viðmerkingum til tað, sum løgmaður førdi fram. Sjálvur fari eg at skriva mína røðu í vikuskiftinum, sigur politski formaðurin, sum annars heldur, at Kaj Leo Johannesen helt eina nokso ”klassiska” røðu á ólavsøku, sum hann tekur til.

John Johannesen vísir á, at løgmaður ikki er úr hansara flokki, og hann heldur, at røðan eisini var merkt av tí flokki, hann kemur úr.

- Eg saknaði tað, sum liggur fyri framman, men hetta fara vit at vísa á, nú løgmansrøðan kemur til viðgerðar, endurtekur politiski formaðurin hjá Javnaðarflokkinum.


*- Eg saknaði tað, sum liggur fyri framman í røðu løgmans á ólavsøku, sigur John Johannesen*